# RØÐA LØGMANS

# &

# LØGLISTI

# Røða løgmans

Harra formaður.

Eins og sandkornið í søguni um glataðu spælimenninar eftir William Heinesen eru vit ein lítil partur av altjóða samfelagnum. Men vit verða kortini ongantíð minni, enn vit sjálv vilja. Vilja vit verða ein miðdepil millum aðrar, so hava vit møguleikarnar og ríkidømið til tess.

Ein miðdepil fyri okkum, sum búgva og liva her, fyri tey, sum hava hug at seta búgv í Føroyum, og fyri tær tjóðir, ið vit samstarva við. Eitt samfelag, har øll eru vælkomin, har øll sleppa til orðanna, og har avbjóðingar eru fyri øll. Har rættvísi og samhaldsfesti eru eyðkennini, og har øll kenna seg væl.

Harra formaður.

Ferðin á búskapinum er minkað, bæði úti í heimi og í okkara samfelag. Høgu oljuprísirnir hava noytt partar av fiskivinnuni í knæ. Heima við hús merkja vit eisini, at oljurokningin er hækkað munandi, at matvøruprísirnir eru hækkaðir, og rentan við. Og tey, sum hava roynt seg við íløgum í partabrøvum, síggja eisini myrk skýggj í løtuni.

Jú, vit merkja øll hesa skeivu búskaparligu gongdina.

Men búskapurin er væl fyri. Arbeiði er til øll, tí bæði í vinnuni og hjá tí almenna er brúk fyri góðum og dugnaligum fólki.

Lat meg siga tað heilt greitt. Vit eru ikki á veg inn í eina kreppu sum ta í níti árunum.

Í dag er almenna skuldin lítil, og landið hevur pening tøkan.

Í níti árunum, tá landskassin var niðurpíndur av veðhøldum og bankabjargingum, kom skuldin upp á 6,7 mia. – meira enn 100 prosent av BTÚ. Í dag er skuldin hjá landskassanum 2,1 mia. – einans 15 prosent av BTÚ, umframt at landið eigur 2,3 mia. á bók. Samlað eiga Føroyar eina nettuogn á umleið 3 mia. krónur.

Arbeiðsloysið er metlágt, umleið 1 prosent – hóast tað møguliga er hægri í ávísum økjum. Hetta er tað lægsta í vesturheiminum. Í níti árunum var arbeiðsloysið uppi á heili 25 prosentum.

So vit eru væl fyri, um viðrákið tó hevur hæsað av eina løtu.

Ratingstovnurin Moody´s gav eisini búskapi og fíggjarstýring okkara gott skotsmál. Tað ber boð um, at útheimurin hevur álit á Føroyum.

Men hann øtlar vindin. Tí ræður um at repa seglini og í felag nýta góðan sjómansskap, so vit koma um streingirnar í øllum góðum og í slættari og rúmari sjógv.

Harra formaður.

Okkum tørvar grundleggjandi broytingar, ið skapa eitt nýtt og betri skeið í søgu okkara við munandi støðugari búskapargongd.

Eftir løgtingsvalið í januar varð valt at skipa aðra samgongu. Ein og hvør samgonga hevur síni mál, sum hon vil fremja, meðan onnur mál verða løgd til viks, tí semja fæst ikki um tey. Tí er neyðugt við nýggjum politiskum samstarvi, soleiðis at átrokandi mál ikki koma at liggja ov leingi óloyst.

Vit í landsstýrinum og í samgonguni hava sett okkum fyri at ganga undan í hesum broytingartíðum og taka tær røttu avgerðirnar – ikki bara avgerðir, sum geva úrslit í morgin ella í ovurmorgin, men eisini langt fram í tíðina.

Og her er Visjón 2015 týdningarmikil vegvísi, tí í henni hava serfrøðingar, áhugabólkar, vinnulív og fakfeløg sett orð á, hvussu vit kunnu gerast millum fremstu tjóðir.

Tað er okkara ábyrgd at fremja visjónina í verki og at tryggja eitt gott lívsgrundarlag hjá okkum, sum búgva her, og teimum, sum vilja koma til Føroya. At tryggja ta liviligu vælferðina.

Vit standa við eitt vegamót við stórum avbjóðingum, har tann størsta er at broyta bygnaðin í fiskivinnuni.

Samgongan hevur sett sær fyri at fremja eitt siðaskifti í fiskivinnupolitikkinum. Tað verður eitt tað týdningarmesta vinnupolitiska átakið, síðan einahandilin varð avtikin í 1856.

Støðan í stórum pørtum av fiskiveiðuflotanum er ring. Fleiri orsøkir eru til tess. Lágir fiskaprísir og óvanliga høgir oljuprísir. Stovnarnir á heimaleiðunum eru niðurfiskaðir, serliga toskastovnurin, ið ongantíð hevur verið so illa fyri. Søla og keyp av fiskiskipum og fiskiloyvum seinastu árini – sonevnda yvirkapitaliseringin – liggur sum steinur oman á byrðu.

Landsstýrið hevur eina greiða heildarætlan fyri fiskivinnuna. Vit vilja hava eina burðardygga og dynamiska fiskivinnu, har politiskar forðingar og peningaligur stuðul ikki avskepla marknaðarkreftirnar. Vinnan má tillaga seg, tí tað er ein avgjørd fyritreyt fyri einum sterkum og sjálvberandi búskapi, at høvuðsvinnan klárar seg uttan stuðul úr landskassanum.

Fiskivinnan hevur altíð dugað at tillaga seg, og eg havi fult álit á, at hon eisini megnar tað hesa ferð.

Í fyrsta lagi skulu fiskastovnarnir endurreisast sum skjótast, so at vit tryggja fiskatilfeingið í framtíðini. Hetta gerst best við at taka lívfrøðiligu tilmælini í fullum álvara. Hetta verður eisini staðfest í uppskotinum, sum landsstýrismaðurin í fiski- og tilfeingismálum fer at leggja fram á hesum fundi.

Veiðuorkan kemur í eina nýggja legu, og tað fer sum frá líður at geva størri vinning til manning og skip, og bæði vinnulívið og samfelagið fáa meira burturúr. Tá toskastovnurin er komin fyri seg aftur, kunnu vit helst fiska eini 30.000 tons um árið. Tað er tríggjar ferðir so nógv, sum varð avreitt í 2007. Nógvar hundrað mió. kr. afturat bara í avreiðingarvirði kunnu fáast burturúr, um vit røkja stovnarnar skynsamt.

Í øðrum lagi er bráðneyðugt, at okkara fiskavørur verða framleiddar í eini burðardyggari og umhvørvisvinarligari vinnu. At fara væl um tilfeingið verður alt meira avgerandi í framtíðini. Tí

mugu vit sum skjótast fáa føroyskan fisk góðkendan sum burðardyggan, tí hetta eru krøv, sum longu verða sett fiskaframleiðarum.

Í triðja lagi mugu vit endurskoða allar lógir, sum leggja forðingar fyri fiskivinnuna. Skipanin við uppboðssøluni skal eftirmetast. Sama skulu spurningarnir um tilvirking av fiski umborð og avmarkingarnar at landa uttanlands. Vit skulu eggja til, at alt tilfeingið, eisini rogn og livur, kemur til høldar.

Skipað verður ein tilfeingisbúð ella ein fiskidagamarknaður, har øll rættindi til tilfeingi hjá landinum skulu handlast frítt, so at øll áhugað hava atgongd til náttúruríkidømið – til fólksins ogn.

Hetta er ein kúvending frá fastlæstu støðuni í dag, har øll rættindi eru bundin at útlutaðum loyvum, sum eru galdandi til 1. januar 2018. Ein skipan, sum hevur víst seg at vera meira til gagns fyri tey, sum fara úr vinnuni, enn fyri tey, sum ætla sær inn í hana.

Eg vænti, at longu um eini 3-4 ár síggjast úrslitini av siðaskiftinum í fiskivinnupolitikkinum aftur í búskapinum – ella fyrr, um vistfrøði og tilgongd vera okkum til vildar. Tí er tað sera hugaligt, at gróðurkanningarnar eru av teimum heilt frægu, og meira lív er í sjónum.

Landsstýrið og samgongan eru sannførd um, at kósin má broytast. Vit eru eisini til reiðar at góðtaka eitt hall á fíggjarlógini fyri at halda virksemi í gongd og leggja upp fyri sveiggjum í búskapinum, meðan fiskivinnan tillagar seg.

Landsstýrið fer eisini at leggja seg eftir at gera íløgur á teimum økjum, sum verða meinast rakt, so at stoyturin ikki verður so harður.

Vit taka ímóti hesi avbjóðing, sum fer at gera Føroyar til ein miðdepil, ið gevur burðardyggari vinnu og skynsamari viðferð av tilfeinginum størsta gætur.

Harra formaður.

Ongum nýtist at stúra, tí her er arbeiði til allar hendur. Men broytingin í fiskivinnuni kann fara at merkja, at nøkur fólk mugu fara í aðra vinnu, at fólk mugu skifta arbeiði.

Kendi skotski uppfinnarin, Graham Bell, segði eina ferð, at tá ein hurð fer í lás, fer onnur upp á bak. Men trupulleikin er, at mangan síggja vit bara ta afturlatnu hurðina og ikki ta opnu. Kring landið eru fólk, sum fara at finna nýggjar møguleikar, ið vit ikki vistu av vóru fyri framman.

Okkara vælferðarsamfelag skal leggja upp fyri hesum umskifti. Tí er umráðandi, at arbeiðsmegin hevur fakligan førleika og dagførda vitan. Ófaklærd skulu fáa tilboð um førleikamenning, eina umskúling, har fólk kunnu nema sær útbúgving og fáa skeiðstilboð, so tey kunnu átaka sær nýggjar avbjóðingar.

Brúk verður fyri fleiri hondum og góðum høvdum á flestu økjum. Arbeiðsfólk og handverkarar til at smíða íbúðir og hús, víðka infrakervi og skapa virði. Eisini á øðrum økjum er brúk fyri góðum fólki, serliga innan útbúgving, heilsu, røkt og tænastur.

Eitt alneyðugt átak var útlendingalógin, sum ger málsviðgerðina smidligari og skjótari fyri arbeiðsmegi úr ES-londum. Útlendingamál og marknaeftirlit verða yvirtikin í valskeiðnum, og vit fara tá at fyrisita útlendingalógina eftir føroyskum fyritreytum.

Sett er á stovn útlendingastova, ið skal málsviðgera og kunna útlendingar um teirra rættindi og skyldur og geva teimum bestu fyritreytir fyri at trívast í Føroyum.

Útlendingar, sum velja at virka og liva her, skulu vera hjartaliga vælkomnir. Vit skulu vera góð og fólkalig við tey, eins og vit eru hvør við annan.

At arbeiðsfólk flytur millum lond er ikki nýtt. Tað gera føroyingar eisini. Tí skulu vit ikki seta kikaran fyri blinda eygað, men síggja veruleikan og fáa skipað viðurskifti.

Útlendsk arbeiðsmegi, sum kemur til Føroya, skal sjálvandi arbeiða eftir teimum sáttmálum, sum eru á arbeiðsmarknaðinum.

***

Eins og fiskastovnarnir eru eitt tilfeingi, sum krevur skynsama viðferð, so er vitan tað sama – og kanska tað týdningarmesta av øllum.

Besta íløga í vitan er útbúgving. Tí skal útbúgvingarøkið av álvara mennast.

Tá vit sum foreldur fylgja børnum okkara í skúla fyrsta skúladag, skulu vit kenna okkum trygg. Børnini skulu kenna seg sum miðdepilin í heiminum. Hvørt ár fara umleið 700 børn í fyrsta flokk. Hesi børn mynda okkara framtíð.

Tað er í fólkaskúlanum, at grundin verður løgd undir eina seinni útbúgvingarleið. Tí skulu børnini vera í tryggum hondum. Vit hava góðar fólkaskúlalærarar, sum gera eitt gott arbeiði. Og vit vilja gera okkara til, at fólkaskúlin verður eitt enn betri stað – bæði hjá næmingum og lærarum.

Lærarar og skúli skulu hava amboð at menna lesiførleikan í skúlanum. Tí verður stovnað nýggj útbúgving fyri lesiráðgevar.

Vit fara eisini í næstum at gera afturvendandi kanningar av trivnaði og nøgdsemi hjá næmingum, lærarum og foreldrum.

Í vár vóru aftur landsroyndir, sum saman við eftirmetingum eru neyðug amboð til tess at tryggja, at fakliga menningin er á rættari kós.

Vit arbeiða miðvíst fyri, at børn okkara koma heim við nútímans føroyskum bókum í skúlataskuni. Dentur skal eisini leggjast á, at tilfarið er í teldutøkum líki og kann brúkast í undirvísingini saman við tíðarhóskandi KT-amboðum.

Sernámsfrøðiliga økið skal styrkjast og samskipast.

Í dag eru fleiri dag- og skúlatilboð til børn og ung við serligum tørvi, og fleiri nýggir møguleikar til næmingar við atferðar-, tilknýtis- og trivnaðartrupulleikum eru ávegis. Øll hesi tilboð skulu samskipast á einum staði, so foreldur og avvarðandi bara hava eitt stað at venda sær til.
Soleiðis fáa vit ein fólkaskúla fyri øll.

Grundarlagið undir fólkaskúlanum verður lagt í barnagarðinum. Tí skulu tilboð, ætlanir og mál samskipast frá dagstovni til miðnám.

Lesiætlanarnevnd er sett at gera felags ætlanir fyri alt landið í øllum lærugreinum, frá dagstovni til miðnámsskúla.

Bæði læraraútbúgvingin og námsfrøðiliga útbúgvingin verða nú uppstigaðar til bachelorlestur.

***

Í vár vórðu Fróðskaparsetrið, Læraraskúlin og Sjúkrarøktarfrøðiskúlin lagdir saman.

Hetta er fyrsta stigið at samskipa hægri útbúgvingar í ein lærdóms- og granskingarmiðdepil. Ein miðdepil, ið skal tryggja samfelagnum og vinnulívinum viðkomandi útbúgvingar og gransking á hægsta altjóða stigi. Í ár vórðu bodnar nýggjar útbúgvingar í løgfrøði, hav- og jarðfrøði og kunningartøkni.

Vit ætla eisini at gera samstarvsavtalur við lærustovnar í útlondum, so at vit fáa møguleika at fáa alskyns útbúgvingar við fjarlestri. Stuðulsskipanin skal broytast, so at tey, ið lesa fjarlestur fulla tíð, eisini fáa lestrarstuðul.

Nýggju miðnámsútbúgvingarnar verða eftir ætlan klárar at seta í verk, tá skúlaárið byrjar í 2009.

Arbeiðið at endurskoða yrkisútbúgvingarnar er farið í gongd. Málið er, at tær verða góðkendar á sama stigi sum samsvarandi útbúgvingar í grannalondunum. Vit ætla at stovna ein tænastuskúla til matvøru-, kokka- og tænaraútbúgvingar.

Tey, sum fara undir útbúgving her heima, skulu kunna halda fram við víðari útbúgvingum, bæði í Norðurlondum og aðrastaðni.

***

Okkum tørvar alsamt meira og nýggjari vitan; tí hevur granskingin so stóran týdning.

Málið er, at í 2015 skulu 3% av BTÚ verða nýtt til gransking og nýskapan. Her skal tað almenna ganga á odda, men skulu vit røkka málinum, má vinnan fíggja sín part. Í dag verður minni enn 1 prosent av BTÚ nýtt til gransking, har tað almenna rindar meira enn tríggjar fjórðingar.

Vísindaráðið, ið er mannað við landsstýrisfólkum og umboðum úr vísindaumhvørvinum og vinnuni, er valt og fer til verka fyrsta dagin. Vísindaráðið skal seta yvirskipað mál og leiðreglur fyri gransking og geva henni kjølfesti í føroyska samfelagnum.

Tríggjar granskingarkjarnar hava í fleiri ár virkað undir Fiski- og tilfeingismálaráðnum. Granskað hevur verið í veiðutøkni, framleiðslutøkni og biotøkni. Peningur er settur av til eina kjarnu afturat, sum skal granska í fiskivinnu og búskapi.

Fiskaaling arbeiðir m.a. við verkætlanum at ala toskayngul og við ílegukanningum av toski. Stórir menningarmøguleikar eru í toskaaling, tí føroyskur sjógvur er vælegnaður til hetta endamálið.

Gongur eftir ætlan verða vit longu í 2009 partur av granskingarverkætlanini hjá ES, har 380 milliardir krónur verða latnar í stuðli frá 2007 til 2013.

Vit skulu verða miðdepilin, sum liggur fremst á teimum granskingarøkjum, vit raðfesta.

***

Ein umskipað fiskivinna, betri útbúgvingar og nýggj vitan føra áhaldandi til nýskapan – innovasjón. Fjølbroytnið í vinnulívinum veksur, og tað er gott fyri búskapin.

Fíggjarvinnan mennist, og KT-fyritøkur eru nú førar fyri at kappast við útlendskar fyritøkur – bæði her og uttanlands.

Alivinnan er komin væl fyri seg aftur og verður óivað eitt sterkt bein afturat í búskapinum.

Farið er undir triðja oljuútbjóðingarumfar, og tað tykist, sum stórur áhugi framvegis er. Góðu royndirnar eystan fyri og sunnan fyri markið og methøgi oljuprísurin eru sjálvandi eisini atvoldin til áhugan.

Búskapargrunnurin skal setast á stovn. Grunnurin skal nýtast til at leggja serinntøkur til síðis, eitt nú inntøkur frá oljuvinnuni og einskiljingum.

***

Góðir ferðamøguleikar stuðla upp undir og tryggja menning og trivnað í landinum. Tað skal vera lætt, trygt og ódýrt at ferðast ímillum, og vit mugu eisini royna at gera tað lættari og bíligari at sleppa út í heim.

Føroyar skulu ikki vera ein útjaðari. Hetta krevur, at vit hava eitt gott samferðslukervi.

Í Vágum verða flogvøllurin og terminalurin útbygdir, og skipað verður tollfrí søla. Arbeitt verður við at dagføra flogferðslulógina, so vit kunnu gerast partur av evropeiska flogferðslumarknaðinum. Tað merkir kapping, sum skuldi givið betri tænastu og lægri prísir.

Eg haldi, at tilmælið frá tunnilsnevndini er eitt gott støði at brúka, tá arbeiðini at gera Skálafjarðar- og Sandoyartunnilin skulu leggjast meira ítøkiliga til rættis. Hesir tunlar verða størstu samferðsluútbyggingar í Føroya søgu. Umráðandi er tí, at vit neyvt stýra bæði fíggjarliga og tøkniliga váðanum.

Kunningar- og samskiftistøkni hjá tí almenna og vinnuni er týðandi grundarlag undir nýskapanini og skal vera við til at lyfta landið frá ídnaðarsamfelag til innovatiónssamfelag. Eitt gott talgilt undirstøðukervi er ein fyritreyt fyri vinnumenningini. Fyri at skapa upp aftur betri karmar fyri KT og aðrari samskiftisvinnu verða møguleikarnir kannaðir fyri at skipa eitt alment netfelag, sum umfatar alt samskiftiskervið.

Landfrøðiliga liggja vit fjarskotin í Norðuratlantshavi, men í KT eru ongar fjarstøður – har eru vit við einum vælútbúnum fólki og einum góðum undirstøðukervi í miðdeplinum.

Harra formaður.

Vælferðin eyðkennir tað góða samfelagið. Samgongan arbeiðir fyri einum samhaldsføstum samfelag, har hvør einstakur hevur mest møguligt frælsi, og har allir borgarar eru tryggjaðir javngóðar umstøður, uttan mun til sosiala støðu, likamligan ella menningarligan førleika.

Tá ein ung kvinna – kanska eftir lokna útbúgving – situr uttanlands og umhugsar at flyta heim aftur, skal hon síggja land okkara sum ein miðdepil við góðum og vælvirkandi vælferðartænastum. Vit skulu vera landið, sum tekur vælferðina hjá allari familjuni í álvara.

Samgongan hevur longu lagt til brots við greiðum vælferðarpolitiskum raðfestingum í fíggjarlógini fyri 2008.

Barsilsfarloyvið er longt við seks vikum – farloyvið hjá pápanum tvær vikur. Og barsilsfarloyvið verður stigvíst økt, so tað verður eitt ár, tá ið hetta samgonguskeiðið er runnið.

Sjúkradagpengalógin verður broytt, so at foreldur kunnu halda frí fyrsta sjúkradag hjá børnum sínum uttan mótrokning í lønini. Hetta skulu tey kunna gera tíggju dagar um árið fyri hvørt barn undir 14 ár. Tað eru serliga tímalønt á privata arbeiðsmarknaðinum, ið enn ikki hava henda rætt tryggjaðan.

Vælferð er eisini høvið at seta búgv og at flyta úr einum bústaði í annan. Í dag er bústaðarmarknaðurin ov avmarkaður. Møguleikarnir at velja sær best hóskandi bústað eru ov fáir.

Tey, sum fyrstu ferð skulu seta búgv, hava ikki nógvar aðrar møguleikar enn at keypa sær sethús ella íbúð fyri milliónaupphæddir. Tað sigur seg sjálvt, at hetta er ógjørligt hjá eitt nú teimum lægstløntu ella hjá einum støkum uppihaldara. Og tað er ein ræðandi tanki hjá ungfólki, sum júst hevur fingið sær útbúgving uttanlands, at fyrsta stigið fyri at flyta heim aftur er at læna einar tvær milliónir til bústað.

Her skulu vit duga betur.

Alneyðugt er við fleiri bústaðarmøguleikum. Landsstýrið fer tí at fremja bústaðarloysnina í hesi tingsetu.

Tey, sum leiga, skulu eisini hava trygg kor. Tí verður nýggj leigulóg løgd fyri tingið í heyst.

Framløgd verður eisini nýggj arbeiðsskaðatryggingarlóg, sum veitir munandi betri sømdir at viðurkenna sjúku og mein sum arbeiðsskaða, umframt at betri møguleikar vera fyri endurgjaldi og samsýning.

Farið verður undir at byggja upp eina landsfevnandi endurvenjingarskipan.

ST-sáttmálin um javnrættindi fyri fólk við breki skal samtykkjast.

Her skal vera trygt og gott at gerast gamal. Tey eldru skulu hava møguleika fyri at vera sum longst í egnum heimi. Tí skulu heimabúgvandi fáa neyðuga hjálp og vegleiðing.

Stórar útbyggingar eru framdar á eldraøkinum, men tíðin er komin at arbeiða meira miðvíst við at menna innihaldið á stovnum innan eldraøkið.

Tað er at gleðast um, at fólk livir longri, og at alsamt fleiri pensjónistar kunnu njóta lívsins heyst. Men samstundis verða tey færri, sum eru í virkisførum aldri.

Hetta er ikki nøkur eldrabyrða. Tað orðið havi eg hoyrt, men tað er ikki til í mínum høvdi. Tvørturímóti fáa vit eitt ríkari samfelag fyri øll ættarlið. Avbjóðingin er at tryggja, at nóg mikið av peningi er til pensjónir, eldrarøkt og sjúkrarøkt. Og tað ber væl til.

Ein langtíðarætlan at endurskipa eftirlønar- og pensjónsøkið er komin væl áleiðis. Landsstýrið ætlar, at ein størri partur av pensjónini skal fíggjast uttan fyri landskassan, har hvør einstakur borgari sparir upp til sína egnu pensjón.

***

Skatta- og avgjaldspolitikkur er annar grundarsteinur undir einum samhaldsføstum samfelag, har breiðastu herðar bera tyngstu byrðar.

Broytingar skulu gerast í skattalóggávuni, soleiðis at lóggávan – eisini tann kommunala – verður meira progressiv, tað er, at lutfalsliga meira verður kravt í skatti frá høgu inntøkunum.

Fyrstu stigini eru tikin. Arbeitt verður við at taka av kringvarpsgjaldið og sjúkrakassagjaldið. Í staðin skulu hesi gjøld rindast um skattaskipanina.

Arbeiðsmarknaðurin skal gerast rúmligari. Tey, sum kunnu, skulu hava møguleika at arbeiða, og fólk við skerdum førleika skulu í størri mun gerast partur av arbeiðsmarknaðinum. Skipanin við endurbúgving er vorðin smidligari, so at tað loysir seg betur at arbeiða hjá fyritíðarpensjónistum. Skipanin við vardum størvum verður endurskoðað.

***

Hvørki vinna ella borgarar støðast í einum landi, har politisku raðfestingarnar bert røkka eitt ár fram í tíðina ella í besta lagi eitt valskeið. Tí er Visjón 2015 ikki bara ein bók. Hon er ein vegvísi til at taka avgerðir, ið røkka longri fram í tíðina.

Samgongan hevur sett sær fyri at broyta fíggjar- og búskaparpolitikkin, soleiðis at hann kemur at fevna um bæði land og kommunur.

Ein týðandi partur av fólkaræðinum er, at avgerðirnar verða tiknar so nær fólkinum, sum til ber. Hetta er ein atvold til, at fleiri uppgávur verða fluttar kommunum at umsita. Ein onnur orsøk er, at vit kunnu spjaða spennandi og avbjóðandi uppgávur og førleikakrevjandi størv kring landið. Hetta dregur ungfólk til økini.

Eisini verður neyðugt at endurskoða kommunalu skattaskipanina, so at hon gerst samhaldsfastari, eins og tørvur er á at seta í verk útjavningarskipan millum økini.

Til alt hetta krevst, at kommunurnar eru størri og sterkari.

Kommunurnar gerast alsamt færri, men síðani 2001 eru tær bert fækkaðar úr 48 niður í 34. Kommunusamanlegging er ikki eitt mál í sjálvum sær, men ein fyritreyt at menna økini kring landið, og tí hevur landsstýrið sett sær fyri at minka kommunutalið til sjey kommunur hetta valskeiðið. Ein skilagóð tíðarfesting kundi verið 1. januar 2010.

Tílík umlegging kann vera ring at góðtaka hjá teimum, ið stúra fyri at missa sín samleika; men eg eri sannførdur um, at til ber at varðveita staðbundna samleikan, hóast kommunalu eindirnar verða størri.

***

Vit skulu hava góðar heilsutænastur. Fakligar ósemjur ella trætur um umsitingarligan bygnað mugu ikki á nakran hátt taka tíð og orku frá fremstu uppgávuni hjá sjúkrahúsverkinum – at hava sjúklingin í fokus.

Vit seta nú sjøtul á eina menningarætlan fyri sjúkrahúsverkið, har lyklaorðini eru samskipan, fíggjarstýring og dygdarmenning.

Besta menningin fæst við at skipa sjúkrahúsverkið sum eina samvirkandi eind við einari leiðslu.

Tað er eitt støðugt krav um meiri pening til sjúkrahúsverkið – útreiðslurnar bara vaksa. Tí er neyðugt at eftirmeta, um játtanin verður brúkt so skynsamt, sum til ber. Ein av hesum eftirmetingum er í gongd og verður væntandi liðug í oktober. Út frá henni skal gerast ein neyvari játtanarskipan, so lættari verður at síggja, hvat peningurin skal brúkast til, og hvussu hann verður brúktur.

Eg leggi dent á, at landsstýrið ætlar ikki at gera heilsutænastuna verri. Men vit mugu vissa okkum um, at vit fáa fult virði fyri hvørja krónu.

Ein strategisk menningarætlan er sett í verk, bæði fyri starvsfólk og heilsutænastur, og fyrsta sjúklinganøgdsemiskanningin er framd, har níggju av tíggju sjúklingum hava eina góða ella sera góða heildarfatan av innleggingini.

Arbeitt verður støðugt við at betra um møguleikarnar at samstarva við onnur lond um sjúkuviðgerðir og um at førleikamenna starvsfólk. Farið er eisini undir at gera eina krabbameinsvirkisætlan, sum verður liðug komandi ár.

Nýggja læknavaktin er eitt stórt framstig. Atfinningar hava tó verið um, at skipanin ikki virkar nóg væl í Norðoyggjum. Tí verður ein royndarskipan sett í verk, har ein kann koma til kommunulæknaviðtalu í Klaksvík eftir avtalu uttan fyri vanliga viðtalutíð.

Sum týðandi fólkaheilsuátak er almenna rúmið gjørt roykfrítt.

Fleiri átøk eru í umbúna fyri at styrkja psykiatriska økið. Í heyst verður lagt fram uppskot til nýggja psykiatrilóg, sum styrkir rættindini hjá sjúklingum.

Eisini á heilsuøkinum vilja vit vera ein miðdepil, har vit øll kenna okkum at vera í kønum hondum, tá vit koma í samband við sjúkrahúsverkið. Og vit skulu vera ein miðdepil, sum dugir og vil brúka teir møguleikar, ið eru í grannalondunum, tá okkara egnu dygdir ikki røkka til.

***

Uttanríkispolitikkur og altjóða samstarv eru lykilin til at menna samfelagið í 21. øld. Alheimsgerðin ger heimin minni og skapar nýggjar marknaðir. Skal eitt samfelag standa seg í hesum umskiftistíðum, má tað kunna tillaga seg, verða ein virkin leikari og gerast partur av heiminum.

Vit skulu finna okkum fótafesti í hesi broyttu verð. Tær tjóðir, ið gera seg til miðdepil og virka í nógvum londum, draga fólk og virksemi til sín.

Vit hava góðar fyritreytir at menna okkum í alheimsgerðini og at berja okkum burtur úr vanaáskoðanini, har vit síggja okkum sjálv sum ein útjaðara, ið ikki er førur fyri at røkja egin áhugamál. Okkara land og sjógvur eru ein stórur og strategiskt týdningarmikil partur av Norðuratlantshavi. Vit eru ein miðdepil í hesum øki, sum fær alt størri týdning í heimshøpi, tá ið

ræður um náttúrutilfeingi, veðurlagsbroytingar, umhvørvi, varandi orku, nýggjar siglingarleiðir og broytta javnvág millum stórveldini.

Fyri at byggja út altjóða undirstøðukervið er skipað eitt uttanríkisráð, ið skal røkja føroysk áhugamál í útlondum.

Miðað verður eftir at hava fólk á øllum sendistovum okkara, ið burturav fáast við útflutningsframa. Sendistovurnar fara eisini at bjóða fram tænastur og høli til eitt nú fyritøkur.

Ætlanin er stútt og støðugt at vísa umheiminum, hvat okkara vinna og mentan hava at bjóða.

Til at menna okkara sambond og vinnuvirksemi mugu vit lata upp dyr, og tað gera vit best við áhaldandi samskifti og ávirkan. Tí har ein ikki er sjálvur, er ein ikki meira enn hálvur, og frægasti vegur at bøta um hetta er at hitta fólk á máli í teirra egna landi.

Samstarvið við ES verður endurskoðað, til tess at vørur, tænastur, kapitalur og persónar frælst kunnu flyta seg millum okkum og samveldið.

Diplomatisku átøkini at vinna EFTA-limaskap halda fram og hava nýliga borið ávøkstur. EFTA hevur gjørt av at seta nevnd at greina eina víðkan av felagsskapinum, har Føroyar eru høvuðsevnið.

Samstarvið við Ísland verður røkt og støðugt útbygt sambært Hoyvíkssáttmálanum. Eisini hava fundir verið við stjórnina á Isle of Man um at fáa oynna við í sáttmálan. Málið er at fáa eitt fríhandilsøki í útnorðri og at víðka Hoyvíkssáttmálan til eisini at fevna um Grønland og Noreg.

Skulu vit seta Føroyar sum miðdepil í Norðuratlantshavi, mugu vit knýta samstarvsbond við allar tjóðir í økinum, og tí er málið at fáa í lag semjur um samvinnu við Skotland, Ongland og Írland, umframt Kanada og Russland.

Sterka støða okkara sum fiskivinnutjóð má gerast sjónligari og virknari á heimspallinum, har fiskivinna, umhvørvi, matvørutrygd og burðardygg menning eru til viðgerðar. Okkara servitan og royndir á hesum øki koma bæði okkum sjálvum og øðrum til góðar í slíkum samstarvi.

Eitt gott stig á leiðini er sjálvstøðuga umboðanin, vit fingu í FAO í fjør. Hesum hava vit longu fingið nógv burturúr, m.a. við egnari rødd í samráðingum um at orða leiðreglur fyri botnfiskiskapi í altjóða sjógvi og um ein nýggjan altjóða sáttmála um tiltøk at basa ólógligum fiskiskapi.

Vit eiga virðismiklar partar í teimum stóru uppisjóvarfiskastovnunum á okkara leiðum. Hesi fiskirættindi hava næstan eins stóran týdning fyri búskapin sum allur botnfiskiskapurin undir Føroyum.

Møguleikarnir at royna á nýggjum leiðum skulu eisini kannast og mennast.

***

Nú er stundin komin, at vit taka enn størri ábyrgd á umhvørvisøkinum. Eingin er útjaðari í umhvørvisstríðnum. Øll eru miðdeplar. Vit mugu og skulu eisini gera okkara. Tað hevur alstóran týdning fyri okkara sjálvsvirði og umdømi sum tjóð.

Landsstýrið er tí farið undir at gera eina virkisætlan á veðurlagsøkinum, har bólkar eru settir at gera ítøkilig uppskot um tiltøk at minka um útlátið av vakstrarhúsgassum.

Orkumál eru longu raðfest frammarlaga. Miðað verður eftir at skipa almennu ferðsluna, so at minkað verður um CO2-útlátið, og skrásetingargjaldið er hækkað fyri mest dálkandi bilarnar. Ein fiskifloti, sum verður lagaður eftir ráðiligastu veiðuni, fer sjálvandi eisini at gera stóran mun í CO2-útlátinum.

Landsstýrið hevur sett sær fyri, at vit skulu vera við á veðurlagsráðstevnuni í Keypmannahavn í 2009, har endamálið er at samtykkja ein nýggjan altjóða sáttmála um at skerja CO2-útlátið. Landsstýrið vil binda seg til sáttmálan, men strembar eftir at leggja upp fyri serføroyskum viðurskiftum.

Harra formaður.

Sjálvbjargni er aðalmál hjá einum og hvørjum samfelag, fólki og tjóð. Og fyritreytin fyri sjálvbjargni er at taka sjálvsábyrgd. Samgongan ætlar at halda fram við ætlaðu yvirtøkunum. Málið er miðvíst at fáa ein sjálvberandi búskap, soleiðis at vit gerast fíggjarliga óheft og skapa einar sjálvbjargnar Føroyar.

Harra formaður

Tá vit leggja sandkornið inn undir sjóneykuna síggja vit landið, fólkið og tað, sum bindur okkum saman – mentanina. Á ólavsøku rennur alt hetta saman í eina hægri eind og gevur okkum eitt virði, sum ikki skal ella kann metast í krónum og oyrum.

Mentan er samleiki og ger okkum til eitt fólk – eina tjóð.

Mentanin er høvuðsorsøkin til, at vit búgva her, og tann atdráttarmegi, ið skal draga tey heim aftur, sum búgva uttanlands – tey, sum búgva í útjaðaranum á føroysku mentanini.

Tí uttan eina mentan hvørvur eitt fólk.

Vit skulu skapa rúm, sum eru frístøð hjá okkum øllum, rúm sum eru gróðrabotnurin fyri teimum tonkum og hugskotum, meiningum og lívsáskoðanum, sum eru grundarlagið undir hesum samfelagi – okkara mentan.

Sum ein liður í hesum arbeiði fer samgongan at skipa eitt Tjóðsavn, ið skal savna og samskipa søvnini – okkara mentanararv. Tjóðsavnið skal styrkja grundleggjandi liðirnar í savnshugsjónini, sum eru at savna, granska og ikki minst at skapa kunnleika. Tí mentan skal liva og knýta fólk saman.

Annar týðandi partur av mentanarliga arbeiðinum er at sýna máli okkara tign og frama.

Vit eru vís í, at íløgur í mentanarligt arbeiði koma fleirfalt aftur – kanska meira í lívsgóðsku enn í krónum. Og vit gleða okkum til tey næstu árini at arbeiða saman við og lurta eftir teimum mongu eldsálum, sum arbeiða á hesum øki.

Harra formaður.

Vit standa framman fyri stórum avbjóðingum, og vit skulu taka avgerðir um, hvønn veg samfelagið skal fara – ikki bara nú – men eisini langa tíð frameftir.

Vit eru tann miðdepil, sum vit gera okkum. Vit eru miðdepilin í Norðuratlantshavi, vit eru miðdepil saman við túsund øðrum miðdeplum í nýggja heiminum, vit eru miðdepilin, sum vil samstarva og læra av útjaðaranum uttan fyri okkum.

Vit standa kanska á gáttini til størstu broytingartíð hjá okkara ættarliði. Eg heiti tí á Føroya Løgting um at vit liva upp til ta ábyrgd, sum fólkið hevur litið okkum upp í hendi.

At vit hava vísdóm og dirvi at føra landið framá saman við Føroya fólki.

Nú tørvar okkum Tróndar skarpa vit, Sigmunds bjarta hjartalit og Sverris vilja sum stál.

Góða ólavsøku

Jóannes Eidesgaard
løgmaður

# Løglisti

## Løgmansskrivstovan

- **Aðalorðaskifti um Visjón 2015**
  Endamálið er at skifta orð um "Mál og vegir" ið lýsir, hvussu Føroyar kunnu gerast millum fremstu tjóðir.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum**
  Uppskot verður lagt fram um at taka yvir málsøkið Sakførarvirksemi.
  Uppskot verður lagt fram um at taka yvir málsøkið Ognarrætt.
  Uppskot verður lagt fram um at taka yvir málsøkið Upphavsrætt.
  Uppskot verður lagt fram um at taka yvir málsøkið Revsirætt.
  Uppskot verður lagt fram um at taka yvir málsøkið Sjórætt.

## Uttanríkisráðið

- **Frágreiðing til løgtingið um uttanríkismál**
  Endamálið er at skifta orð um uttanríkismál Føroya.

- **Uppskot til løgtingslóg um Uttanríkistænastu Føroya**
  Lóg sum skipar føroysku uttanríkistænastuna.

- **ST-sáttmálin um rættindu teirra brekaðu**
  Sáttmálin verður lagdur fyri løgtingið til politiska støðutakan, soleiðis at sáttmálin kann setast í gildi í Føroyum, samstundis sum hann verður settur í gildi í Danmark.

- **Uppskot til samtyktar um at verja ozonlagið**
  Uppskot til samtyktar um at góðkenna, at landsstýrið mælir ríkismyndugleikunum til at strika fyrivarni fyri Føroyar til tær broytingar í Montrealprotokollini frá 16. september 1987 um evni, ið bróta niður ozonlagið, sum vóru samtyktar í Montreal tann 17. september 1997 og í Beijing tann 3. desember 1999.

## Fíggjarmálaráðið

- **Uppskot til ríkislógartilmæli um gildiskomu í Føroyum av eini røð av lógarbroytingum viðvíkjandi donskum tænastumonnum**
  Í høvuðsheitum snýr tað seg um at dagføra lóggávuna viðvíkjandi donskum tænastumonnum og øðrum donskum starvsfólkum í Føroyum, so lóggávan er tann sama í Føroyum og í Danmark.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vegskatt**
  Lógin um vegskatt verður broytt, soleiðis at ein partur av verandi vegskatti verður lagdur um til $CO_2$-avgjald. Eftir nýggju lógini koma bilar við stórum útláti at gjalda lutfalsliga meira og bilar við lítlum útláti koma at gjald lutfalsliga minni í vegskatti samanborið við galdandi lóg.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Toll- og skattafyrisiting**
  Ætlanin er at endurskoða og dagføra toll- og skattafyrisitingarlógina samsvarandi bygnaðinum í skipanini. Umhugsað verður eisini at taka av lokalu kærunevndirnar.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skattafría samanlegging**
  Ætlanin er at endurskoða og dagføra skatta reglurnar í sambandi við spaltning (umvent fusión).

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Kapitalvinningsskatt**
  Broyting verður gjørd í lógini viðvíkjandi vinningi av rentum av lántøku í sambandi við keyp av virðisbrøvum. Uppskot verður gjørt um ásetingar í sambandi við leiguinntøkur.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í Skattalógini**
  Ætlanin er at endurskoða reglurnar í sambandi við skatting av starvsfólkapartabrøvum, at endurskoða reglurnar í sambandi við skatting av sendimonnum, og at endurskoða viðurskiftini í sambandi við samskatting av hjúnum. Sjálvuppgávan og ognaruppgerðin verða endurskoðaðar og dagføringar krevja broytingar í skattalógini. Og ætlanin er at gera broytingar í lógini, soleiðis at skattafríar veitingar verða lagdar út til arbeiðsgevaran at umsita sum standardfrádráttir í sambandi við flyting av lønum.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Rentutrygging**
  Skatting og frádráttarheimildir verða dagførdar í samsvar við lógina um tryggingarvirksemi.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Avskriving**
  Lógin verður endurskoðað roknskapartøkniliga og dagførd.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í Tolllógini**
  Lógaruppskot verður lagt fram um at víðka eftirlitsheimildirnar, soleiðis at tollarar fáa atgongd til ferðafólkalistarnar. Kanningar verða gørdar, soleiðis at innflutningur úr menningarlondum kann verða tollfríur.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Meirvirðisgjald**
  Hildið verður fram at strika undantøk í meirvirðisgjaldslógini, soleiðis at meirvirðisgjaldsskipanin verður so breið og lítið kappingaravlagandi sum gjørligt. Forðandi ásetingar móti konkursrúttarum verða gjørdar, og pantiheimildirnar dagførdar.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Punktgjøld**
  Kappingaravlagandi punktgjøld verða strikaði, soleiðis at føroyskir handlar kunnu kappast við útlendskar handlar á hesum økinum. Hetta fer at flyta ein stóran part av søluni av hesum vørum til Føroyar.

- **Uppskot til ríkislógartilmæli um broytingar í lógini um fíggjarligt virksemi**
  Gildiskoman verður 1. januar 2009.

- **Uppskot til ríkislógartilmæli um broytingar í lógini um íløgufeløg, serlig íløgufeløg og aðrar kollektivar íløguskipanir**
  Gildiskoman verður 1. januar 2009.

- **Uppskot til ríkislógartilmæli um broytingar í lógini um virðisbrævahandil**
  Gildiskoman verður 1. januar 2009.

- **Uppskot til ríkislógartilmæli um broytingar í lógini um fyribyrging av peninga hvítvaski og fyribyrging av terrorismu**
  Gildiskoman verður 1. januar 2009.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Lønhæddaravgjald**
  Lógin verður endurskoðað og dagførd í sambandi við grunnar og við greiðari lýsing av fíggjarvirksemi.

- **Uppskot til løgtingslóg um Arvaavgjald**
  Uppskot verður gjørt til nýggja arvaavgjaldslóg.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um rentustuðul**
  Uppskot verður gjørt um tillaging av rentustuðlinum.

- **Uppskot til løgtingslóg um Búskapargrunn**
  Uppskot verður lagt fram um Búskapargrunn, har inntøkur frá einari møguligar føroyskari oljuvinnu, einskiljingarinntøkur og aðrar serinntøkur verða beindar í.

- **Uppskot til løgtingslóg um elektroniskar fakturar**
  Lógaruppskot verður gjørt um elektroniskar fakturar, sum skulu avloysa pappír fakturar.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Tænastumenn**
  Dagføringar verða gjørdar í tænastumannalógini.

- **Uppskot til løgtingslóg um eftirløn**
  Dagføringar verða gjørdar í lógini um eftirløn.

- **Uppskot til løgtingslóg um Tvískattasáttmálar**
  Uppskot verður lagt fram um tvískattasáttmála við Norðurlond.

- **Uppskot til løgtingslóg um Norðurlendskir hjálparsáttmálar**
  Uppskot verður lagt fram um hjálparsáttmála við Isle of Man.
  Uppskot verður lagt fram um hjálparsáttmála við Jersey.
  Uppskot verður lagt fram um hjálparsáttmála við Gournsey.
  Uppskot verður lagt fram um hjálparsáttmála við Aruba.
  Uppskot verður lagt fram um hjálparsáttmála við Hálendsku Antillurnar.

## Almanna- og heilsumálaráðið

- **Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi nýggja psykiatrilóg fyri Føroyar**
  Við hesi lóg verður núverandi lóg frá 1938 skift út við eina meira tíðarhóskandi lóg, um rættindi hjá sálarsjúklingum, ið verða settir undir tvingsil. Ríkislógartilmælið verður væntandi lagt fyri Løgtingið í september 2008.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í forsorgarlógini**
  Dagføringar verða gjørdar, soleiðis at lægsta veitingin til fyribils og varandi hjálp, heldur enn at vera tengd at grundarupphæddini hjá fólkapensjónistum, verður tengd at grundarupphæddini hjá fyritíðarpensjónistum. Uppskotið verður lagt fram í oktober.

- **Uppskot til leigulóg**
  Stórur tørvur er á eini dagførdari lóggávu, sum ásetir treytir og krøv í sambandi við leigubústaðir. Lógaruppskot verður væntandi lagt fyri Løgtingið í september mánaði.

- **Uppskot til løgtingslóg um lutaíbúðir**
  Við hesi lógini verður møguligt at fara undir at byggja vanligar lutíbúðir og serstakar lutaíbúðir, sum verða nýskapandi fyri føroyska bústaðamarknaðin og fyri vardar bústaðir hjá førleikatarnaðum. Lógaruppskot verður væntandi lagt fyri Løgtingið í oktober mánaði.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í sjúkradagpengalógini í sambandi við barnsins 1. sjúkradag**
  Lógin fer at tryggja tímaløntum arbeiðstakarum á privata arbeiðsmarknaðinum endurgjald fyri inntøkumissi í sambandi við fráveru frá arbeiðinum orsakað av barnsins 1. sjúkudegi. Uppskotið verður lagt fyri Løgtingið hesa tingsetuna.

- **Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi nýggja autorisatiónslóg fyri heilsustarvsfólk**
  "Autorisationsloven", sum er sett í gildi í Danmark, skal setast í gildi í Føroyum, soleiðis at tær ymisku autorisatiónslóginar á heilsuøkinum verða samlaðar í eina lóg, og seinastu dagføringarnar verða tiknar við. Uppskotið verður lagt fyri Løgtingið í heyst.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting av løgtingslóg um ættleiðingastuðul**
  Á Ólavsøku verður uppskot um at hækka ættleiðingarstuðulin lagt fyri Løgtingið. Eftir ætlan verður ættleiðingarstuðulin hækkaður úr 50 tús.kr. í 75 tús.kr. til útreiðslur í samband við ættleiðingina.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Fólkaheilsuráð**
  Lógin er um at broyta samansetingina v.m. av Fólkaheilsuráðnum.

- **Uppskot til løgtingslóg um valdsnýtslu á stovnum**
  Løgtingsins umboðsmaður hevur víst á, at tað mangla reglur um valdsnýtslu, og at hesar ásetingar eiga at gerast í lóg og ikki í kunngerð. Uppskot til broyting í forsorgarlógini viðv. reglum um valdsnýtslu á stovnum verður væntandi lagt fyri Løgtingið hesa tingsetuna.

- **Uppskot til løgtingslóg um av vælferðarráði**
  Vælferðarráðið skal meta um framtíðarútlitini, greina tær avbjóðingar, ið standa fyri framman, og birta uppundir orðaskifti, ið kann stimbra viljan til framhaldandi, burðardygga og ábyrgdarfulla menning av einum samhaldsføstum vælferðarsamfelagi. Uppskotið verður lagt fram hesa tingsetuna.

- **Uppskot til verklagslóg um byggivirksemið á Landssjúkrahúsinum**
  Út- og umbyggingarnar hava verið tarnaðar av økta eftirspurninginum eftir arbeiðsmegi til byggivinnuna, men hava annars gingið eftir ætlan. Landsstýrismaðurin fer at dagføra langtíðarætlanina, so hon verður tillagað broyttu umstøðurnar, og verklagslógir samsvarandi hesum verða lagdar fyri tingið í heyst.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting av studningslóg fyri ellis- og røktarheim**
  Neyðugt verður at leingja verandi lóggávu, tí nakrar av verkætlanum, sum tilsøgn varð givin til, verða ikki lidnar innan árslok, tá lóggávan fer úr gildi. Ætlanin er eisini at geva tilsøgn til eina verkætlan í norðoyggjum, samstundis sum ein nýggj lóggáva skal gerast við eina nýggja tørvskanning. Uppskot verður lagt fyri Løgtingið í september.

## Løgmálaráðið

- **Uppskot til Ríksilógartilmæli um "ikrafttræden for Færøerne af forskellige ændringer til straffeloven"**
  Endamálið við uppskotinum er at dagføra revsilógina á ymsum økjum, eitt nú viðvíkjandi barnapornografi og edv kriminaliteti. Somuleiðis er ætlanin at herða revsingina fyri grovan harðskap, grov umhvørvisbrotsverk og neyðtøku.

- **Uppskot til Ríksilógartilmæli um at seta "Værgemålsloven" í gildi fyri Føroyar**
  Endamálið við at seta værgemålsloven í gildi fyri Føroyar er at betra rættarstøðuna hjá teimum ómyndugu. Lógin kemur í staðin fyri myndugleikalógina frá 1922. Ein avleiðing av at seta Værgemålsloven í gildi fyri Føroyar er, at neyðugt verður at gera broytingar í eini røð av øðrum lógum, sum skulu hava tilvísingar til Værgemålsloven.

- **Uppskot til løgtingslóg um at broyta kommunuvallógina**
  Endamálið er at heimila at halda kommunuval í úrtíð fyri samanleggjandi kommunur.

- **Uppskot til løgtingslóg um náttúruvernd**
  Við nýggju lógini verður fyrisitingin av náttúruverndini nútímansgjørd. Størri atlit verða tikin at varðveita og verja margfeldi í náttúruni, samstundis sum rúm verður fyri menning av samfelagnum. Fyrisitingarliga verður nýggja lógin umsitin av kønum fakfólki í landsfyrisitingini undir ábyrgd hjá landsstýrismanninum í umhvørvismálum. Lokala tilknýtið verður tó framvegis tryggjað við náttúruverndarnevndum, ið ráðgeva landsmyndugleikanum og ummæla náttúruverndartiltøk.

- **Uppskot til løgtingslóg um broytingar í matrikuleringslógini**
  Matrikuleringslógin er ógreið og regulerar ikki nøkur grundleggjandi viðurskifti um ávísar serligar eigindómar, ið hava tørv á at verða skrásettir í matriklinum. Hetta er serliga viðvíkjandi eigindómum, ið eru skaptir undir jørð sum t.d. tunlar, ella viðvíkjandi eigindómum, ið eru skaptir á turrløgdum ella uppfyltum lendi av sjóøki.

## Fiski- og tilfeingismálaráðið

- **Uppskot til løgtingslóg um um vinnuligan fiskiskap**
  Áseting av fiskidøgum fyri fiskiárið 2008/2009.

- **Uppskot til løgtingslóg um nýggja tilbúgvingarlóggávu**
  Yvirskipaðar lógarásetingar innan tilbúgvingarøkið skula vera staðfestar í serskildari lóg júst um økið, og ikki í ymsum øðrum lógar- og kunngerðarverki sum í dag.

- **Uppskot til løgtingslóg um trygd á sjónum**
  Greiðari samskipan av kærumyndugleikanum, sum í dag er skipaður í fleiri eindum.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í Brunalógini**
  Dagføring av gildistíð.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skipaskráseting**
  Endamálið er at dagføra lógina serliga við atliti at umlegging til EDV. Ætlanin er, at nýskipa skipaskrásetingina soleiðis, at allir almennir upplýsingar frameftir kunnu takast út av einum skrásetingarportali.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsjørð**
  Løgtingslógin um landsjørð verður endurmett og broytingaruppskot verður lagt fram á ting samsvarandi politisku niðurstøðuni. Ætlanin er hartil at endurskipa og í mest møguligan mun at savna alla búnaðarlóggávuna, men hetta er somikið stórt arbeiði, at tað neyvan verður búgvið til tingborð í hesi tingsetuni.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjómenn**
  Greiðari samskipan av kærumyndugleikanum, sum í dag er skipaður í fleiri eindum. Harnæst er ætlanin at fremja broytingar innan økið, ið staðfestir, at tað almenna skal gjalda fyri heilsukanningar av sjófólki.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um mánaðarligan minstaforvinning**
  Eitt aðalmál í fiski- og tilfeingispolitikki landsstýrisins er at skipa fiskivinnuna eftir vanligum marknaðar- og kappingartreytum. Hetta er staðfest í samgonguskjalinum. Ætlanin við broytingum í hesi lóggávu er eitt av tiltøkunum, ið hevur til endamáls at skipa vinnuna liberalt innan frælsar marknaðartreytir.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um flutningsstuðul**
  Meginøkið er broytt almikið seinstu árini við gerð av tveimum undirsjóvartunlum. Endamálið við ætlaðu lógarbroytingunum er at venda aftur til upprunaendamálið, sum var at endurgjalda fyri kappingarmismunin, ið fyrst og fremst komst av undirstøðuforðingunum í firðum og sundum. Ætlanin er at tillaga flutningsstuðulin hesum veruleika samsvarandi broytingunum í ferðslumynstrinum.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtigslóg um vinnuligan fiskiskap**
  Dagføringar verða gjørdar í sambandi við ásetingar um rogn, bøtur (tá ið landað verður uttanlands), livrar og um krav um sølu á uppboðssølu. Í samgonguskjalinum hjá hesi samgongu er staðfest, at: "skipast skal soleiðis fyri, at mest møgulig virðisøking úr føroyskum tilfeingi liggur eftir í Føroyum, og allir úrdráttir av veiddum fiski koma til virkingar og gagns í framleiðsluni". Endamálið við lógarbroytingini er, at føra hesa ætlan út í lívið.

- **Uppskot til løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um manning (Manningarlógin)**
  Ymsar dagføringar, eitt nú við tí fyri eyga at skipa kæramynduleikan greiðari, sum eina felags eind fyri sjóvinnuøkið.

- **Uppskot til verkslóg og lýsing av nýggjum havrannsóknarskipi**
  Skjøtul er settur á bygging av havrannsóknarskipi. Projekteringin er boðin út og avgreidd. Næsta stigið er at viðtaka verklagslógina, sum endaliga skal tryggja grundarlagið fyri samlaðu ætlanini. Verklagslógin verður løgd fram saman við eini greiðari lýsing av endaligu verkætlanini.

- **Uppskot til løgtingslóg um veðurtænastu**
  Málsøkið er júst yvirtikið, soleiðis at føroyskir myndugleikar nú hava lóggávuvald økinum ímeðan sjálv ígildiskoman av lógini kemur í gildi 1. apríl 2009. Endaligur leistur er tó ikki enn lagdur við atliti at, hvussu ein føroysk verðurtænasta verður skipað, og hvussu vit skipa okkum mótvegis DMI. Ætlanin við hesum lógarbroytingum er at staðfesta hesi viðurskifti ítøkiliga.

- **Uppskot til løgtingslóg um loðstænastu**
  Fiski- og tilfeingismálaráðið er farið undir at fyrireika skipan av loðstænastu undir føroyskum ræði. Endamálið við lóg innan økið er m.a. at staðfesta yvirtøkuna, og hvussu økið skal skipast annars.

- **Uppskot til løgtingslóg um vitaverk**
  Fiski- og tilfeingismálaráðið er farið undir at fyrireika skipan av vitaverki undir føroyskum ræði. Endamálið við lóg innan økið er m.a. at staðfesta yvirtøkuna, og hvussu økið skal skipast annars.

## Vinnumálaráðið

- **Uppskot til løgtingslóg um fast samband millum Streymoy og Eysturoy og millum Streymoy og Sandoy**
  Lógaruppskotið hevur til endamáls at veita landsstýrismanninum heimild at stovna ella keypa partafelag, hvørs endamál skal vera at gera fast samband millum Eysturoy og Streymoy og millum Streymoy og Sandoy og hartil hoyrandi vegagerð og at hava rakstur av tunlunum um hendi.

- **Uppskot til løgtingslóg um talgildar undirskriftir**
  Lógaruppskotið hevur sum endamál at fremja trygga nýtslu av talgildum undirskriftum.

- **Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi lóg um loftferðslu**
  Lógaruppskotið hevur til endamáls at dagføra karmarnar um flogferðsluna til Føroyar og úr Føroyum.

- **Uppskot til løgtingslóg um havnir**
  Lógaruppskotið hevur sum endamál at gera skilhaldsreglur fyri havnir og reglur um havnavirksemi umframt um vernd av havnum.

- **Uppskot til løgtingslóg um aling av fiski v.m.**
  Lógaruppskotið hevur sum endamál at dagføra og tillaga reglurnar serliga viðvíkjandi veitan av loyvum.

- **Uppskot til løgtingslóg um um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða**
  Løgtingslógin hevur til endamáls at dagføra og tillaga reglurnar á økinum í samsvari við lóggávuna á hesum økinum í hinum norðurlondunum.

- **Uppskot til løgtingslóg um broytingar í ymsum lógum viðvíkjandi FAS**
  Endamálið er at gera FAS-skipanina til eina kappingarføra altjóða dygdarskrá.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um smápartafeløg**
  Løgtingslógin hevur til endamáls at ajourføra lógina so hon er í samsvari við ES-lóggávu.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um partafeløg**
  Løgtingslógin hevur til endamáls at ajourføra lógina so hon er í samsvari við ES-lóggávu.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ársroknskap**
  Løgtingslógin hevur til endamáls at ajourføra lógina so hon er í samsvari við ES-lóggávu.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vinnurekandi grunnar**
  Løgtingslógin hevur til endamáls at ajourføra lógina so hon er í samsvari við ES-lóggávu.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um grannskoðarar**
  Løgtingslógin hevur til endamáls at ajourføra lógina so hon er í samsvari við ES-lóggávu.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um matvørur**
  Løgtingslógin hevur til endamáls at ajourføra lógina so hon er í samsvari við ES-lóggávu.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsumhvørvi**
  Løgtingslógin hevur til endamáls at ajourføra lógina generelt, umframt at hon er í samsvari við ES-lóggávu á flogferðsluøkinum í sambandi við at Føroyar gerast partur av ECAA-avtaluni.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu**
  Løgtingslógin hevur til endamáls at stuðla undir nýtsluna av trygdarbelti og trygdarútgerð, og at stuðla undir fatanina, at rúsdrekka og ferðsla als ikki hoyra saman. Harumframt er ætlanin at broyta sektarupphæddirnar og gera aðrar tillagingar í lóggávuni.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fjarskifti**
  Løgtingslógin hevur til endamáls at strika frekvensgjaldið fyri radioútgerð hjá bjargingarfeløgum, og at gera tað møguligt at endurnýggja ávís radioprógv á Skipaeftirlitinum. Harumframt er ætlanin at gera aðrar smærri broytingar í lógini.

## Mentamálaráðið

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirskúla**
  Endamálið við at endurskoða eftirskúlalógina er at fáa greiðari býti av útreiðslunum millum land og stigtakarar til eftirskúla.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skúlatilboð til ung við breki**
  Lógin er tíðaravmarkað til 1. august 2009, tá ið støða skal takast til, um hetta skal verða eitt framhaldandi tilboð til ung við breki.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkaskúlan**
  Kravið til leiðarar í fólkaskúlanum er, at teir skulu hava lokið fólkaskúlalæraraútbúgving og hava nomið sær leiðsluútbúgving. Møguleiki skal verða fyri, at eisini onnur, ið hava leiðslu- og námsfrøðiligan førleika og aðra viðkomandi útbúgving, kunnu verða sett sum leiðarar í fólkaskúlanum. Grundgevingin fyri hesum er m.a., at læraraútbúgvingin verður á bachelorstøði. Eisini skulu ásetingar gerast um tagnarskyldu í sambandi við kunngerð av úrslitum av lands- og støðuroyndum og ásetingar um, hvussu eftirmetingin skal fremjast v.m.

- **Uppskot til løgtingslóg um valkirkjulið**
  Endamálið er at áseta reglur um, hvussu limir í fólkakirkjuni kunnu taka seg saman at skipa, fíggja og reka valkirkjulið, ið ikki er tengt at ávísari kirkjusókn.

- **Uppskot til løgtingslóg um kirkjulig val**
  Lógin fer at snúgva seg um, hvussu kirkjuráð, próstadømisráð og stiftsstjórnarlimur verða vald.

- **Uppskot til løgtingslóg um at velja biskup**
  Lógin fer at snúgva seg um, hvussu kirkjuráð og prestar velja biskup.

- **Uppskot til løgtingslóg um størv í kirkjuni**
  Lógin verður um, hvussu kirkjuráð og prestar velja biskup, hvussu prestur og próstur verður kallaður og settur, umframt hvørji førleikakrøv verða sett nevndu embætisfólkum. Í lógini verða eisini ásetingar um tænastuskyldu, sum t.d. búðstaðarskyldu.

- **Uppskot til løgtingslóg um kirkjubygningar**
  Lógin verður um, hvussu kirkjubygningar verða umsitnir og vardir, og hvussu farið verður fram, verður kirkja bygd ella tikin av.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í lógtingslóg um kringvarp**
  Lógin verður broytt í sambandi við, at kringvarpsgjaldið verður lagt um til innkrevjing gjøgnum skattaskipanina.

- **Uppskot til løgtingslóg um útbúgvingarlóg fyri gymnasiala miðnámsskúlaøkið**
  Lógaruppskotið er ein rammulóg, sum fevnir um bygnaðin fyri gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar. Lógaruppskotið kemur í staðin fyri tær 7 lógirnar, ið galdandi eru á økinum í dag. Ásett verður í lógaruppskotinum hvussu ein nútímansgerð av gymnasialu miðnámsútbúgvingunum verður framd í verki.

- **Uppskot til løgtingslóg um stovnslóg fyri alt miðnámsskúlaøkið**
  Henda lóg verður galdandi fyri allar skúlar, ið bjóða út miðnámsútbúgvingar.

- **Uppskot til løgtingslóg um fólkaupplýsing**
  Nýggj lóg verður gjørd um fólkaupplýsing, sum fatar bæði um frítíðarundirvísing, háskúla og húsarhaldsskúla.

- **Uppskot til løgtingslóg um Tjóðsavn Føroya**
  Ætlanin við lógini er at fáa eina rammulóg, sum fevnir um bygnaðin á savnsøkinum.

- **Uppskot til løgtingslóg um upphavsrætt**
  Endmálið er at skipa uppshavsrættin við løgtingslóg eftir yvirtøku.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um bókasøvn**
  Endurskoðan av bókasavnslógini við atliti m.a. til býti millum land og kommunu.

- **Uppskot til løgtingslóg um broyting í lógtingslóg um Fróðskaparsetur Føroya**
  Í sambandi við samanleggingina av Fróðskaparsetri Føroya, Føroya Læraraskúla og Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya verður neyðugt at avtaka gomlu lógirnar fyri Føroya Læraraskúla og Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya. Hetta, saman við at Vinnuháskúlin skal takast upp í samstarvið, fer at gera, at broytingar í lógargrundarlagnum fyri Fróðskaparsetrið verða neyðugar.